# Átak 15

*Við verkstovum at styrkja samstarv yvir um geirar og markamót*

**Endamál:** At fakbólkar á eini verkstovu fáa høvi at viðgera samstarvið við aðrar fakbólkar, so tað frameftir verður lættari at samstarva – eisini tvørtur um geirar og fakøki – og at fakfólk vita nær, og hvussu tey geva upplýsingar av týdningi víðari til onnur fakfólk, til gagns fyri tann harðskapsrakta.

**Mettur kostnaður:** 100.000 kr.

**Ábyrgd:** Almanna- og mentamálaráðið, Heilsumálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Løgmálaráðið, Kvinnuhúsið

**Tíðarætlan**: 2023

-----------------------------

## Frágreiðing

Hoyringarnar hjá arbeiðsbólkinum í sambandi við heildarverkætlanina hava víst, at tað eru avbjóðingar við samstarvi millum fakbólkar og stovnar, ið hava við harðskapsøkið at gera.

Eitt afturvendandi evni hevur í hesum sambandi verið, at lógarásetta tagnarskyldan verður sæð sum ein forðing fyri samstarvi og samskipan tvørtur um myndugleikar. Yrkisfólk siga seg ivast í, um ella nær tey kunnu lata upplýsingar víðari til aðrar yrkisbólkar og myndugleikar. Í hvønn mun kunnu ein lærari og ein heilsusjúkrasystir tosa saman um ein næming? Og kann ein jarðarmóðir lata upplýsingar víðari til Gigni, um hon hevur illgruna um harðskap?

Heildarætlanin fyri harðskap í parlagi og nærsambondum frá 2011 vísir á sama trupulleika, og tað sama ger Rúsevnisheildarætlanin frá 2022.

Yrkisfólk hava sostatt gjøgnum nógv ár sagt seg ivast í, hvussu lógarásetta tagnarskyldan skal skiljast. Ein vandi við hesum er, at yrkisfólk yvirtulka tagnarskylduna og ikki lata upplýsingar víðari, sum kunnu ella møguliga eiga at verða latnar víðari. Fakfólk uppliva av somu orsøk, at tey ikki fáa neyðuga kunning, um eitthvørt er áfatt.

Í hesum sambandi skal nevnast, at bæði fyrisitingarlógin og dátuverndarlógin eftir umstøðunum loyva (ella áleggja), at ávísar upplýsingar verða latnar víðari. Bæði arbeiðsbólkurin frá 2011 (harðskapur) og arbeiðsbólkurin frá 2022 (rúsevnir) mæla til at gera eina vegleiðing til yrkisfólk um tagnarskylduna, og hesum tekur arbeiðsbólkurin undir við.

Her skal nevnast, at í 2022 var bóklingurin „Børn hava rætt til eitt gott lív“ givin út. Bóklingurin er gjørdur í samstarvi millum Barnaverndarstovuna og Sig frá, og er ein vegleiðing til fakfólk um fráboðanarskylduna.

Fakfólk vísa eisini á, at um tey møta einum persóni, ið hevur verið fyri harðskapi, so er einki stað at skráseta harðskapin. Uttan skráseting ber illa til hjá fakfólki at meta um, um støðan er batnað ella versnað, um tann harðskapsrakti kemur aftur, og tað ber ikki til at leita fram og fáa hagtøl um, hvussu støðan er við harðskapi.

Hoyringarnar hava eisini víst, at um tað verður staðfest ella illgruni er um, at ein persónur, ið tey sita yvirav, hevur verið fyri harðskapi, so vita tey ikki nóg væl, hvussu tey skulu spyrja inn til ella handfara tað. Tey meta seg ikki hava neyðugar førleikar og kunnleika til at seta hol á samrøðuna og vita ikki, hvat tey eiga at gera við tað, og hvønn tey eiga at venda sær til.

Av tí at tað eru ivamál um tagnarskylduna, at eingin nøktandi skipan er at skráseta í, og ongar fastar mannagongdir eru fyri, hvussu upplýsingar verða latnar víðari, verða týðandi upplýsingar ikki latnar víðari, tá ið tað er viðkomandi. Vantandi samstarv og vantandi vitanarbýti millum avvarðandi myndugleikar ger tað sera trupult at handfara harðskapsmál og at veita hjálp til harðskapsrakt. Tí er neyðugt við einum átaki, ið gevur fakfólki, ið hava eitt markamót til harðskapsøkið, høvi at hittast og viðgera tær avbjóðingarnar, sum eru við samstarvinum.

Tað verður tí mælt til at skipa fyri verkstovum, har markamót og avbjóðingar við samstarvi verða gjølla viðgjørd. Fyri at tryggja, at tað arbeiðið og tey kjak, ið verða viðgjørd á verkstovunum, ikki verða gloymd, tá ið verkstovan er liðug, verður mælt til, at skrivligt tilfar kemur burtur úr verkstovunum. Her kundi t.d. verið talan um mannagongdir fyri, hvussu upplýsingar um harðskap verða latnar víðari til aðrar fakbólkar. Átakið skal tryggja, at tær skipanir, ið harðskapsrakt børn og vaksin koma í samband við, samstarva, so tann harðskapsrakti verður loftaður beinanvegin.